# Danskt arktektafelag vann kapping um eldradepil



*Halla Samuelsen, forkvinna í sosialu nevn hjá Tórshavnar býráð sigur, at fimm milliónir krónur eru settar av til projektering av eldradeplinum komandi ár*

**Tað verður danska arkitektafelagið, Arkitema, sum sleppur at tekna nýggja eldradepilin, sum skal byggjast á trøðni hjá Júst Sivertsen yviri við Strond í Havn**

ELLISHEIM
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Tað verður helst danska arkitektafelagið, Arkitea, sum fer at tekna nýggja eldradepilin yviri við Strond í Havn.

Sosiala nevnd hjá Tórshavnar býráð viðgjørdi málið í gjár, og umsitingin fer nú at samráðast við danska arkitektafelagið um at fara undir projekteringina.

- Nevndin samtykti at seta fimm milliónir krónur av næsta ár til projektering, sigur Halla Samuelsen, forkvinna í sosialu nevnd. Hon sigur, at nevndin umframt tað eisini hevur samtykt eina fimm ára ætlan, har 38 milliónir verða settar av til økið næstu fimm árini.

- Samtyktin í sosialu nevnd skal so fyrst fyri í figgjarnevndini áðrenn hon endaliga skal samtykkjast í býráðnum, sigur Halla Samuelsen.

Danska arkitektafelagið skrivar um verkætlanina á heimasíðu síni, www.arkitema.dk

Har sigur, felagið, at í vinnaraúppskotinum um eldramiðstøð í Havn hava tey lagt dent á skapa stakar íbúðir, sum allar eru í við í einum størri felagsskapi.

- Hesar íbúðir eru gjørdar soleiðis, at tær eru samleikaskapandi, tey gomlu kenna seg aftur og hava eitt fantasitskt útsýni yvir Nólsoyarfjørð, skrivar Arkitema.

Vit frætta nærri um verkætlanina í einum næstu bløðunum.





*Tekningar hjá Arkitema av nýggja eldradeplinum, sum skal byggjast á trøðni hjá Júst Sivertsen yviri við Strond í Havn*

